## Hósdagur 28. november

**SVF**

17.30 Viftan
18.00 Tobias 6
18.05 Nýggju klæði keisarans
18.15 Dick Whittington
18.25 Smásøga 4
18.30 Atlantis High
19.00 Við Jógvani í Barmi e
20.00 Dagur og Vika
20.25 Grannar okkara
20.50 Gesturin
21.15 Læknin hevur orðið
21.45 Krimitímin: Eitt mál fyri Frost 1:2
23.00 Borð um borð e
23.50 Liðugt

**Eurosport**

07:30 Ski Jumping: World Cup
09:00 Sailing: Sailing World
09:30 Olympic Games: Olympic Magazine
10:00 All Sports: Eurosport Collection
11:00 Grand Touring: 2002 Series Japan Gt Championship Suzuka
11:30 Car Racing: 24h Le Mans Classics
12:30 Football: Special Boban
13:00 Ski Jumping: World Cup
14:30 Weightlifting: World Championship Poland Warsaw
16:30 Football: Special Boban
17:00 Ski Jumping (Live): World Cup Kusamo Finland
18:00 Football: European Championships Legends
19:00 Sailing: Louis Vuitton Cup New Zealand Auckland
20:00 Boxing: World Wbc Title
22:00 News: Eurosportnews Report
22:15 Football: Uefa Cup
00:15 News: Eurosportnews Report

**BBC Prime**

0.00 TLZ: »Richard II«
2.40 TLZ: »Shakespeare Shorts – Twelfth Night«
3.00 TLZ: »Computing for the less Terrified – Word Processing«
3.30 TLZ: »The Money Programme – Blocked Airways«
4.00 TLZ: »From here to Modernity«
4.30 TLZ: »Private Lives«
5.00 TLZ: »Le Club«
5.15 TLZ: »Le Club«
5.30 Look Ahead
6.00 Smarteenies
6.15 The Shiny Show
6.35 Dear Mr. Barker
6.50 Radio Roo: »The Ghost«
7.05 50/50
7.30 Ready Steady Cook
8.15 House Invaders
8.45 Going for a Song
9.15 The Antiques Show
9.45 Changing Rooms: »Camberwell«
10.15 Vets in the Wild
10.45 Lovejoy: »Holding the Baby«
11.45 The Weakest Link
12.30 Passport to the Sun
13.00 Eastenders
13.30 House Invaders
14.00 Going for a Song
14.30 Smarteenies
14.45 The Shiny Show
15.05 Dear Mr. Barker
15.20 Radio Roo: »The Ghost«
15.35 50/50
16.00 Barking Mad
16.30 Ready Steady Cook
17.15 The Weakest Link
18.00 Antiques Roadshow: »Warwick«
18.30 Home Front in the Garden: »Wired«
19.00 Eastenders
19.30 Friends Like These
20.30 Best of British: »Lenny Henry«
21.05 Blackadder II: »Chains«
21.35 Harry Enfield and Chums
22.05 Dangerfield: »Local Colour«
23.00 Cardiac Arrest: »The Body Electric«
23.30 Cardiac Arrest: »Open and Shut«

**BBC World**

00:00 BBC News
00:30 HARDtalk (r)
01:00 BBC News
01:30 Fast Track (r)
01:45 Holiday (r)
02:00 BBC News
02:30 Simpson's World (r)
03:00 BBC News
03:30 Asia Today (r)
03:45 World Business Report (r)
04:00 BBC News
04:30 HARDtalk
05:00 BBC News
05:30 World Business Report
06:00 BBC News
06:30 World Business Report
07:00 BBC News
07:30 World Business Report
07:45 Sport Today
08:00 BBC News
08:30 Fast Track (r)
08:45 Holiday (r)
09:00 BBC News
09:30 Simpson's World (r)
10:00 BBC News
10:30 Asia Today
10:45 World Business Report
11:00 BBC News
11:30 HARDtalk (r)
12:00 BBC News
12:30 World Business Report
12:45 Sport Today
13:00 BBC News
13:30 Top Gear (r)
14:00 BBC News
14:30 Asia Today
15:00 BBC News
15:30 HARDtalk (r)
16:00 BBC News
16:30 Simpson's World (r)
17:00 BBC News
17:15 World Business Report
17:30 Talking Movies (r)
18:00 BBC News
18:30 World Business Report
18:45 Sport Today
19:00 BBC News
19:30 HARDtalk (r)
20:00 BBC News
20:30 Click Online
21:00 BBC News
21:30 World Business Report
22:00 BBC News
22:30 Developing World
23:00 BBC News
23:30 World Business Report (r)
23:45 Asia Today

**TV3**

05:00 Garfield Og Venner
05:25 Børnehjørnet
07:10 Tv-Shop
09:25 Popular
10:20 Popular
11:10 Horton-Sagaen
12:05 Horton-Sagaen
12:55 Ricki Lake
13:55 Menneskejagt
15:40 Ricki Lake
16:35 Robinson Ekspeditionen - Det Endelige Opgør
18:00 Robinson: Bekendelsens Time
18:30 Tv3 Extra - Med Sportsnyt
19:00 Den Eneste Ene
20:00 Pretty Woman
22:25 Frid's Film
23:00 Tv3 Extra - Med Sportsnyt
23:30 Seinfeld
00:00 Louis Vuitton Cup: Kvartfinaler
03:30 Benny Hill
03:40 Godnat

**ÚF**

7.00 Tíðindi
7.05 Morgunlestur
7.15 Barnaløtan - Katrin og Kári stíla fyri
7.30 Tíðindi
7.35 Góðan morgun Føroyar - Jákup Magnussen er vertur
8.00 Tíðindi
8.03 Góðan morgun Føroyar
9.00 Tíðindi
9.03 Sjónarringurin (e) - Árni Joensen leggur til rættis
9.35 Dagsins tónar
9.50 Morgunlestur (e)
10.00 Tíðindi
10.03 Fimleikaløtan 2
10.10 Tit skriva, vit spæla
11.00 Tíðindi
11.03 Á sanganna veingjum (e) - Gunnvør Poulsen stílar fyri
11.35 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.17 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 Sostatt (e) - Bjørt Samuelsen og Elin Winther Poulsen leggja til rættis
15.00 Tíðindi
15.03 Nýtt og gott gamalt - Birgar Johannesen velur løgini
16.00 Tíðindi
16.03 Gospelløtan - Símun Jóannesarson Hansen stílar fyri
17.00 Tíðindi
17.05 Viðurgerði - Sending úr Suðuroy
18.00 Barnaløtan (e) - Katrin og Kári stíla fyri
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Skiftissiðir á lívsleiðini - 8. og seinasta sending - Armgarð Arge leggur til rættis
19.30 Crescendo - Kári Olsen stílar fyri
20.30 David Copperfield - Elin Heinesen lesur 18. part av framhaldssøgu eftir Charles Dickens. Jens Pauli Heinesen týddi
21.00 Tíðindi
21.05 Dagsetur
22.00 Ljóðmúrurin - Regin Egholm skipar fyri
23.00 Tíðindi

## Skiftissiðir á lívsleiðini

*- 8. og seinasta sending*




Marjun Bæk, prestur, svarar spurningum, sum eru komnir inn til sendingina. Jóan Pauli Joensen, fólkalívsfrøðingur sigur frá ymsum í sambandi við deyða og jarðarferð.

## Pretty woman




Richard Gere og Julia Roberts kunnu upplivast – ella endurupplivast – í hesum væleydnaða klassiska romantiska skemtileikinum. Tá tann eydnuríki Edward Lewis (Gere) møtir tí sjálvbjargnu og frælslyntu Vivian Ward (Roberts) verða bæði beinanvegin forelskað. Framførarhátturin hjá Vivian gevur Edwardsa áskoðan til lívið eina útbjóðing, sum skapar eitt brennandi samband millum tey. Hann lærir hana um stíl, og hon lærir hann, at kærleikin kann vera tann besta peningaríløðan nakrantíð.

*Richard Gere (Edward Lewis), Julia Roberts (Vivian Ward), Ralph Bellamy (James Morse), Jason Alexander (Philli Stuckey), Laura San Giacomo (Kit de Luca), Hector Elizondo (Barney) o.o*

**Rás 2**

9.45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10.00 Floksting (e) - Endursending frá í gjár - Hesaferð við Fólkaflokkinum - Sonne Smith leggur til rættis
11.00 Tónleikur
12.00 Tíðindi
12.15 Tónleikur
13.00 Ynskiløtan - Heilsur frá lurtarum - Send heilsur um (www.ras2.fo) ella á fax. 359990
14.00 Lýsingar
14.05 Ynskiløtan (framhald)
15.00 Tíðindi
15.15 Leysaløtan - Innsløg, prát og tónleikur - Sonne Smith leggur til rættis
16.00 Tónleikur
17.00 Norðlýsið - Aktuell sending úr Studio 7 í Klaksvík - John William og Oliver Joensen leggja til rættis
18.00 Tíðindi
18.15 Tónleikur
19.00 Orð á leiðini (EvR) - Evni: Likamið: Samkoma Guds (3:3) - Jógvan Zachariassen leggur til rættis
19.40 Tónleikur
21.00 Tíðindi
21.15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21.30 Tónleikur
22.00 Girlzone - Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri - Telefon: 359993 Fax: 359990 E-mail: girlzone@ras2.fo
0.00 Liðugt

**Lindin**

13.00 Byrjan - Dagsskráin verður lisin
13.05 Bankabók Trúarinnar - eftir C. H. Spurgeon
13.15 Sjólívið v/ Malmberg Olsen
15.00 Tónleikur
16.00 Sjómanssendingin Vitin v/ M.C. Restorff (e)
17.00 Tónleikur
18.00 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti
18.05 Tónleikur
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending
19.15 Tónleikur
20.00 Barnalindin (e)
20.55 Bankabók Trúarinnar - eftir C. H. Spurgeon (e)
21.00 Bønarlinjan, beinleiðis sending við gesti vertur er Jenis av Rana - Bønarevnir kunnu ringjast inn frá kl. 20.00. Tlf. 321377 og til ber at senda fax á nr. 321379 - Heimasíða: www.lindin.fo
0.00 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti (e)
0.05 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð o.a.
2.00 Ein forvitnislig ferð gjøgnum Bíbliuna (e) - v/ Símun Absalonsen og Jógvan Zachariassen
3.00 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð o.a.
6.00 Vit gevast

**ítróttur**

Nr. 225 • fríggjadagur • 22. november 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

VÍF-StÍF 29-32 (16-16):

# Strandingar vunnu ferðmikla toppdystin

**Frá byrjan til enda var ein øgilig ferð á, tá VÍF og StÍF møttust í Vestmanna mikukvøldið. Tá avtornaði, høvdu strandingar vunnið, og tí eru teir aftur oddalið**

MANSHONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*

Um vikuskiftið vendi alt øvugtan veg hjá strandingum. Teir noyddust á heimavølli at lata bæði stigini frá sær í grannauppgerðini móti Tjaldri, ið einki stig hevði fingið frammanundan.

Og tað, sum verri var, var at StÍF við tí tapinum eisini mátti lata oddesessin frá sær til vestmenningar, sum vundu burtur úr triðfremsta liðnum, Neistanum.

Stóri spurningurin undan dystinum í Vestmanna mikukvøldið var tí, um VÍF fór at megna at vísa somu styrkina ella um StÍF kundi reisast aftur eftir hvøkkin og tapið móti Tjaldri.

Svarið fekst ikki fyrr enn móti endanum á dystinum, tí hóast StÍF meginpartin av seinna hálvleiki var bæði tvey, trý og fýra mál framman fyri VÍF, kundi alt henda.

Ikki minst sást hetta móti endanum á fyrra hálvleiki, tá vestmenningar fyrst sóu út til at hava lagt sjógv millum seg og strandingar.

VÍF var á odda 14-12, tá serliga Sveinur Justinussen við trimum málum gjørdi sítt til, at StÍF bæði javnaði og fór framum.

Men John Zachariassen hjá VÍF vildi tað øðrvísi, og við tveimum gjøgnumbrotum fekk hann javnvág í roknskapin, so tað stóð á jøvnum í steðginum.

### Øgilig ferð á

Frá byrjan til enda var hesin toppdysturin merktur av tí, ið ein toppdystur helst skal vera, og sást hetta best á nógvu ferðini, ið var á spælinum hjá báðum pørtum allan dystin.

Álopini skolaðu úr einum enda í hin, og alt gekk so skjótt fyri seg, at áskoðararnir í løtum mundu hava ilt við at fylgja við, hvat hendi. Júst soleiðis skal tað eisini vera, tá tað er ein oddasessur, ið stendur upp á spæl!

Tíðliga í seinna hálvleiki fekk StÍF bygt sær eina leiðslu, ið VÍF ongantíð aftur fekk fatur á, sjálvt um munurin ikki gjørdist tann stóri. VÍF slapp í seinna hálvleiki ikki nærri enn tvey mál.

Hóast nógvu ferðina, so vóru tað kortini strandingar, ið dugdu betur at halda høvdið kalt, og serliga í verjuni var tað, at teir høvdu fyrimunir fram um vestmenningar.

Illa gekk hjá VÍF at koma til skot, tí verjan hjá StÍF vardi væl. Og í hinum endanum tordi StÍF at vísa neyðuga tolið, so málini komu á ymsan hátt, og uttan at bólturin so ofta varð tveittur burtur.

Strandingar høvdu bæði fríspælingar inn á strikuna og gjøgnumbrot úr síðunum, og ein spælari sum Artur Johansen kundi royna nógv sjálvur, tí arbeiðssemið hjá hinum gav pláss fyri tí.

So gjørdi tað heldur einki, at Alexander Johansen móti endanum í gáloysni lobbaði brotskast í føvningin á Eli Müller, ið av góðum grundum líktist einum spurnartekini.

Tá var bara ein góður minuttur eftir, og StÍF á odda við trimum málum.

Liðini fingu eitt mál í part aftrat, og so var veruleikin har: StÍF er aftur oddalið í bestu mans-deildini — men tó bert tvey stig framman fyri VÍF og Neistan



*Strandingar eru nú aftur á odda í bestu mansdeildini. Hetta gjørdist greitt, tá teir í einum ferðmiklum og undirhaldandi dysti vunnu á VÍF fyri aðru ferð hetta kappingarárið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Dysturin í tølum

**VÍF-StÍF 29-32 (16-16)**

Málskjúttar:
VÍF: Áki Olsen 8 (2), John Zachariassen 6, Piti Negru 4, Ólavur Brimnes 3, Agnar Joensen 3, Daniel Rapa 3, Ingi Olsen 2
StÍF: Artur Johansen 10 (6), Costin Dumitrescu 5, Sveinur Justinussen 5, Alexander Johansen 4, Bent Djurhuus 3, Jón Rasmussen 3, André F. Danielsen 1, Kristjan Petursson 1
Brotskøst: VÍF 3, StÍF 8
Útvísingar: VÍF 5, StÍF 2
Dómarar: Hannis Wardum og Eyðun Samuelsen

# Albert verður ikki FS Venjari

**Tvørrandi sampakking millum venjarastarvið og leiðslustarvið á Fiskavirking ger, at albert Ellefsen kortini ikki verður venjari hjá FSV komandi kappingarár**

FS VENJARIN
*Jákup Mørk*

Tað stóð longu greitt sama dagin, sum FS Vágar høvdu tryggjað sær uppflyting til bestu deildina. Albert Ellfsen skuldi aftur í 2003 venja besta liðið hjá felagnum, og við hesum spurninginum avkláraðum, kundi longu tíðliga heyst farast undir restina av fyrireikingunum til árið.

Nú er tó broyting komin í. Sum flestir aðrir av føroysku venjarunum, so hevur Albert Ellefsen eisini starv í privata vinnulívinum at røkja, og tað hevur víst seg, at hetta fæst illa at sampakka við krevjand starvið sum venjari hjá einum fyrstudeildarliðið.

- Albert hevur boðað okkum frá, at hann ikki hevur umstøður at vera venjari hjá okkum komandi ár. Tað harmast vit um, tað er klárt, at hetta hevur givið okkum ein trupulleika, sigur Árni Jacobsen, formaður í FS Vágum.

Spurdur, hvørt felagið er komið nakran veg í leitingini eftir nýggjum venjara, sigur formaðurin, at tað dugir hann illa at siga.

- Tað er bara átta dagar síðani, at vit fingu boðini. Sjálvandi hava vit kannað nakað og havt samband við onkran venjara. Men um tað verður heilt skjótt, ella um tað fer at taka nakað av tíð, áðrenn hetta er avklárað, dugi eg ikki at siga enn, sigur Árni Jacobsen at enda.